Fiskirannsóknarstovan

# Veiða eftir flatfiski við rist

Royndir gjørdar við "Vesturfarinum" 1. - 10. juli og 9. - 19. sept 1996

&

# Veiða eftir flatfiski við skiljineti

Royndir gjørdar við "Randi" 18. - 21. sept 1996



FRS Smárit nr. 97/4

# Veiða eftir flatfiski við rist.

Royndir gjørdar við M/s "Vesturfarinum" 1. - 10. juli og 9. - 19. sept. 1996

Skriva frágreiðing: Kristian Zachariassen.

Við fyri Fiskirannsóknarstovuna: Rógvi, Bárður, Rúni og Kristian

**Endamál:** Endamálið við royndini var, at kanna um tað letur seg gera at veiða flatfisk við rist uttan ov nógva hjáveiðu av toski og hýsu.
Trolbátarnir, sum fiskað á landleiðini innanfyri 12 fj., hava tann trupulleika, at hjáveiðan av toski og hýsu er ov stór. Tí varð avgjørt, at gera royndir við eini rist í trolinum, sum flatfiskurin skal fara ígjøgnum, meðan tann rundi fiskurin skal fara út omanfyri ristina, og verða síladur ígjøgnum ein 200 mm posa.

**Úrslit:** Úrslitið vísti, at hetta letur seg gera, bæði hvat viðvíkur at síla tann runda fiskin frá, og at fáa tunguna ígjøgnum ristina.
Roynd vórðu ymisk snið á ristini, og millumrúmini millum rimarnar vórðu eisini broytt fleiri ferðir.
Eftir fleiri túrar - tilsamans 51 hál - varð komið eftir, at best er at hava eina rist, sum hevur 4 cm ímillum rimarnar, og ein posa, sum er 200 mm omanfyri ristina. Á henda hátt fer tungan ígjøgnum ristina, meðan fiskur, sum ikki gongur ígjøgnum ristina, verður síladur ígjøgnum 200 mm posan. Á henda hátt er møguligt at "lofta" reyðsprøku, havtasku, kalva og tí stóra toskinum. Allur tann smái fiskurin undir 70 cm verður síladur út gjøgnum posan.
Frammanfyri ristina var eitt net fest, sum skuldi stýra fiskinum niður móti niðara kanti á ristini. Roynt varð bæði við og uttan hesum neti, men ikki kundi staðfestast, um netið var til nakra nyttu ella ikki.
Skapið á ristini, sum brúkt varð til seinast, er væl nýtiligt. Ikki er tó vist, at onnur skap á ristini kundi verið eins góð.
Hallið, sum ristin hevði var 50 gradir alla royndartíðina.

Ristirnar, ið royndar vórðu, eru vístar á Mynd 1, 2 og 3.

Eftir at funnið var fram til besta mátan, varð fiskiskapurin sum víst niðanfyri:

| Hál nr. | | Tosk | Hýsa | Havt | Tunga | Reyðsp | Kalvi | Skrubba |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 52 | ov. posi | 210 | 215 | 83 | 6 | 25 | 20 | 25 |
| 52 | nið. posi | 0 | 5 | 2 | 110 | 2 | 4 | 10 |
| | | | | | | | | |
| 53 | ov. posi | 315 | 180 | 0 | 3 | 10 | 10 | 2 |
| 53 | nið. posi | 0 | 100* | 0 | 130 | 0 | 0 | 45 |
| | | | | | | | | |
| 54 | ov. posi | 315 | 200 | 40 | 10 | 30 | 10 | 15 |
| 54 | nið. posi | 0 | 5 | 2 | 110 | 1 | 0 | 10 |
| | | | | | | | | |
| íalt | ov. posi | 840 | 595 | 123 | 19 | 65 | 40 | 42 |
| íalt | nið. posi | 0 | 110 | 4 | 360 | 3 | 4 | 65 |

* Gloppið undir fellunum var ov stórt, tí fellurnar vóru opnaðar 1 hak.

**Útgerð:** Bacalao-trol við 120 mm meskum.
Rist við 3 fellum, og stýrineti frammanfyri.
2 posar báðir 120 mm. Túr nr. 1 -5.
2 posar: niðari 120 mm , ovari 200 mm. Túr nr. 6.
Á Mynd 4 og 5 er tekning av útgerðini.

**Mannagongd:** Byrja var við eini rist, sum hevði 10 cm ímillum rimarnar. Hugsjónin við hesi ristini var at hon skuldi bæði síla og reka, t.v.s. at mett var at toskur og hýsa, sum hava lættari at fara uppeftir tá teir eru komnir aftur í trolið, skuldu fara út ígjøgnum eitt hol í yvurnetinum frammanfyri ristina tá teir sóu rimarnar á ristini. Tað vísti seg beinanvegin at hesin háttur at skilja fiskin uppá ikki virkaði.
Millumrúmið millum rimarnar varð síðan broytt 6,5 cm. Tá sást ein tíðiligur munur og skilligt var at hetta var ein gongd leið at skilja tann runda fiskin frá flatfiskinum.
Tann 3. ristin hevði 6 cm millum rimarnar. Hon skildi allan toskin frá, men tó var ov nógv av smáari hýsu í. Millumrúmini á hesi ristini vórðu síðan broytt til 5,2 cm. posin varð eisini skiftur út við ein annan, sum var gjørdur av tynri tráði enn tann gamli (dupult 6 mm til dupult 4 mm) fyri at síla tað heilt smáu hýsuna frá. Hetta hjálpti væl, men tó kom naka av hýsu í tann niðara posan.
Enn einaferð blivu millumrúmini ímillum rimarnar broytt til 4,5 cm. Tá komu bert einstakar hýsur í posan.
Tann endaliga ristin, ið nýtt varð hevði 4 cm millum rimarnar. Tættari kann ikki vera ímillum tí ein stór tunga er 3,8 cm breið.
Við at hava 4 cm millum rimarnar fer bert tunga og smá reyðsprøka ígjøgnum rimarnar.Restin av flatfiskinum blívur síðan fanga í tí ovara posanum.
Fyri at vita hvussu nógvur fiskur ikki slapp ígjøgnum ristina, var ein 120 mm posi festur í netið omanfyri ristina.
Hallið á ristini var 50 gradir alla royndartíðina.

**Fiskarí:** Fiskiskapurin hjá Vesturfarinum var góður alt tíðarskeiðið. Nógv var til av toski og hýsu, men heldur minni av flatfiski.
Toskurin var góður, so gott sum allur var yvir 55 cm. Hýsan var smáfallandi.
Meginparturin avhýsuni var minni enn 55 cm og umleið 40 - 50 kg í hvørjum háli fóru útaftur. Hetta var mest hýsa, sum var minni enn 30 cm.
Av tungu var minni til av. Ímillum 50 kg og 260 kg ( 1 - 6 kassar) vóru í hvørjum háli. Tó var fyri tað mesta um 135 kg - 225 kg (3 - 5 kassar ).
Av reyðsprøku var heilt lítið til av, um 40 kg vóru í teimum flestu hálunum.
Tann smáa hýsan, sum var í, var mest sum øll í niðara posanum. Hesa hýsuna slapst av við, við at skifta posan út við ein annan av sama slagi, men gjørdan úr tynri tráði. Tann gamli var gjørdur úr dupult 6 mm og tann nýggi var úr dupult 4 mm.

**Niðurstøða:** Royndin vísir, at tað ber til at skilja tann runda fiskin frá flatfiskinum við eini rist. Við at brúka rist í trolinum og ein posa, sum er 200 mm, omanfyi ristina, kann allur fiskur, sum trolbátarnir á landleigini hava loyvi at fiska fáast til høldar uttan at ov nógvur rundur fiskur er í sum hjáveiga.

Millumrúmið ímillum rimarnar á ristini eigur ikki at vera størri enn 4 cm og posin aftanfyri ristina skal ikki vera úr tjúkri tráði enn dupult 4mm. Um posin er úr sverari tráði enn 4mm opna meskarnir í posanum seg ikki og posin sílar tí ikki tað heilt smáu hýsuna, sum er minni enn 20 - 25 cm.
Posin, sum er omanfyri ristina skal vera 200 mm víður.
Vinkulin, sum ristin stendur í og skapið á ristini kann broytast, men millumrúmið ímillum rimarnar eigur ikki at vera meir enn 4 cm.

## Skap av ristunum, sum nýttar vóru til royndirnar við Vesturfarinum



Mynd 1: Tann 1. & 2. ristin, ið royndar vóru. Millumrúmið millum rimarnar var 10 cm á rist nr 1 og 6,5 cm á rist 2.



Mynd 2: Tann 3., 4. & 5. ristin, ið royndar vóru. Millumrúmið millum rimarnar var 6,0 cm á nr 3 rist. 5,2 cm á nr 4 rist, og 4,7 cm á nr 5 rist.



Mynd 3: Tann endaliga ristin, sum nýtt varð. 4 cm vóru millum rimarnar og tríggjar fellur vóru á ristini.




Mynd 4: Posar, rist og ristsektión.



Mynd 5: Trol v.m.: Bacalao trol 360 meskar við 120 mm belli.
80" Thyborøn lemmar.
40 m 16 mm undirbreidlar og forleingarar.
40 m 10 mm yvurbreidlar.




Mynd 6 vísir lutfallið millum posarnar. Tann ovari er 200 mm og tann niðari er 120 mm.




Mynd 7 vísir lutfallið millum posarnar. Báðir posarnir eru 120 mm.

# Veiða eftir flatfiski við skiljineti.

Royndir gjørdar við M/s "Randi" 18. - 21. sept 1996

Skriva frágreiðing: Kristian Zachariassen.

Við fyri Fiskirannsóknarstovuna: Rúni Joensen

**Endamál:** Endamálið við royndini var at kanna um tað letur seg gera at veiða flatfisk uttan ov nógva hjáveiðu av toski og hýsu.
Til royndina var nýtt eitt net, sum var fest mitt í trolinum og rakk aftur í trolposan. Fiskur, sum fór omanfyri skiljinetið skuldi verða sílaður ígjøgnum eitt 200 mm net so at reyðsprøka og havtaska kundi fáast í trolposan. Fiskur, sum fór undir skiljinetinum skuldi fara aftur í tann vanliga trolposan.
Toskur og hýsa fara uppeftir tá teir koma aftur í trolið meðan tunga er niðri við undirnetið allatíðina.
Til royndina var tó 120 mm net nýtt bæði yvir og undir fyri at kunna vita hvussu nógvur fór hvørjumegin skiljinetið.

**Úrslit:** Orsaka av veðri bleiv bert ein túrur gjørdur og tí kann einki endaligt úrslit skrivast, Gjørd vóru 7 hál tilsamans harav bert trý vóru gjørd við skiljineti í trolinum og vísti tað seg at umleið tveir triðingar til eina helvt av toskinum og hýsuni fóru omanfyri skiljinetið. Av flatfiskinum fór ein stórur partur undir skiljinetinum.

| Hál nr. | | Tosk. | Hýsa | Tunga | Reyðspr. | Havt. | Smáhýsa | Skrubba |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4 | Yvur sk.net | 900 | 270 | 5 | 1 | 10 | 0 | 15 |
| 4 | Undir sk. net | 450 | 135 | 10 | 10 | 30 | 5 | 30 |
| | | | | | | | | |
| 5 | Yvur sk.net | 270 | 350 | 0 | | 10 | 20 | |
| 5 | Undir sk. net | 135 | 180 | 45 | | 215 | 70 | |
| | | | | | | | | |
| | | | | | | | | |
| Íalt | Yvur sk.net | 1170 | 620 | 5 | 1 | 20 | 20 | 15 |
| Íalt | Undir sk. net | 585 | 215 | 55 | 10 | 245 | 75 | 30 |

Talva 1: Nøgd av fiski undir og yvur skiljinetinum

**Útgerð:** 360 meskar Stjørnutrol við 120 mm belli og posa
Skiljinet og stálring at festa skiljinetið í
Á mynd 1 og 2 er tekning av útgerðini

**Mannagongd:** Byrja var royndina við at hava skiljinetið í trolinum, men trupulleikar vóru við at taka posan inn orsaka av at posin var broyttur í samband við skiljinetið. Um skiljingina í hesum hálinum kann einki sigast um tí fiskurin kom í bland.
Gjørd vóru síðan tvey hál við einum øðrum troli uttan skiljinet meðan posin og aðrar smávegis broytingar vóru gjørdar.
Hál nr 4 og 5 vóru gjørd við skiljineti í trolinum.

**Fiskarí:** Fiskiskapurin var sera góður henda eina túrin, sum gjørdur varð. Gjørd vóru 7 hál harav 3 hál við skiljinetinum í. Veiðan var tilsamans 15600 kg.
At bert 3 hál vóru gjørd við skiljinetinum kom av at trupulleikar vóru við skiljinetinum og ringinum. Mett var at skiljinetið og ringurin høvdu ov nógva uppdrift. Tí kom trolið at ganga ov leyst av botni og orsaka av hesum at fiska ov illa flatfisk.

**Niðurstøða:** Royndin var ov stutt til at kunna gera nakra endaliga niðurstøðu um hendan háttin at skilja tann runda fiskin frá Flatfiskinum.
Út frá teimum hálunum, sum gjørd vóru vísti tað seg at ov nógvur rundur fiskur fór undir skiljinetinum, men møguliga kann hetta broytast við at flyta skiljinetið niðureftir og kanska eisini flyta tað aftur ella frammeftir í trolinum.
Meginparturin av tunguni fer undir skiljinetinum so við at hava 200 mm í posanum omanfyri skiljinetið skuldi allur flatfiskurin kunna fingist í trolið.
Skiparin á "Randi" metti, at skiljinetið hevði ov nógva uppdrift og at tað tók ov nógvan sjógv á seg tí tað var úr ov sverum tráði. Orsaka av hesum metti hann at grunnurin kom at ganga ov leyst og harvið ikki fiska nóg væl flatfisk
Neyðugt er at gera fleiri royndir næsta vár fyri at vita um møguligt er at skilja toskin og hýsuna frá flatfiskinum á henda hátt við einum nøktandi úrsliti.




Mynd 1: Skiljinet v.m.



Mynd 2: Trol v.m.: Stjørnutrol 360 meskar við 120 mm belli.
84" Thyborøn lemmar.
40 m undirbreidlar 16 mm.
40 m yvurbreidlar 12 mm.
20 m forleingarar 16 mm.